Nr. 106/2019

Jóhannis Joensen
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur viðvíkjandi kyni og útbúgving , settur landsstýrismanninum í uttanríkis- og mentamálum, Jenis av Rana (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Hvussu var kynsbýtið á ávikavist studentaskúlunum, handilsskúlunum, teknisku skúlunum og HF-skeiðunum í Føroyum fyri hvørt ár sær í tíðarskeiðnum 2010-2019?
2. Hvussu var kynsbýtið millum náttúruvísindaligu, handaligu, málsligu og hugvísindaligu fakini á miðnámi fyri hvørt ár sær í tíðarskeiðnum 2010-2019?
3. Hvussu fullu prógtølini á omanfyrinevndu fakum og útbúgvingum, skift á kyn fyri hvørt ár sær í tíðarskeiðnum 2010-2019?
4. Hvussu var kynsbýtið í 2019 fyri miðnámsfakini støddfrøði, evnafrøði, alisfrøði og lívfrøði á ávikavist A og B støði, og hvussu fullu prógtølini í somu fakum, skift á kyn?
5. Hvussu var kynsbýtið á teimum einstøku útbúgvingunum á Fróðskaparsetri Føroya fyri hvørt ár sær í tíðarskeiðnum 2010-2019?
6. Hvussu fullu prógtølini innan einstøku fakini á Fróðskaparsetri Føroya fyri hvørt ár sær í tíðarskeiðnum 2010-2019 skift á kyn?

Viðmerkingar:
Tá ið ung velja útbúgvingarleið, kann vandi vera fyri, at tey lata siðbundnar kynsfatanir avmarka møguleikarnar. Um tey ungu fylgja kynsleiklutunum fram um førleikunum, kann tað í síðsta enda føra við sær, at samfelagið missir møgulig talent og nýhugsan. Hetta kann eisini ávirka arbeiðsmarknaðin, sum verður í vanda fyri at verða verandi kynsuppbýttur.
Tá langtíðarætlanir skulu leggjast, er gott við góðum hagtølum at grunda avgerðirnar á. Um ein skal arbeiða fyri meira javnstøðu í samfelagnum, er tað tí umráðandi at fáa innlit í, hvussu tey ungu velja, hvør útbúgvingarleið hóskar teimum best. Stundum verður nevniliga róð framundir, at ávís fak eru 'gentufak', meðan onnur eru 'dreingjafak'. Spyrjarin er tískil áhugaður í at fáa hagtøl fyri, hvussu kvinnur og menn standa seg í miðnámsskúlunum og á Fróðskaparsetrinum, umframt hvussu kynsbýtið er á teimum ymsu útbúgvingunum.
Serliga hevði verið áhugavert at sæð, hvussu prógtølini fella í náttúruvísindaligu, handaligu, málsligu og hugvísindaligu fakunum á miðnámi, skift á kyn. Somuleiðis hevði verið áhugavert at sæð, hvussu kynsbýtið er á áðurnevndu útbúgvingum og fakum, umframt eitt yvirlit yvir kynsbýtið á ymsu útbúgvingunum á Fróðskaparsetrinum. Við hesum upplýsingunum ber til at varpa ljós á hvar, ella um, átøk skulu fremjast til frama fyri skúlaverkið og arbeiðsmarknaðin.

Á Løgtingi, 16. juni 2020

Jóhannis Joensen